# VARPIÐ





SvF • Sunnudag 10. kl. 21.00

**»Dolly Parton – countrydrotningin«**
Søgan um drotningina innan countrytónleikin, Dolly Parton, er ævintýrið um gentuna, sum kom úr fátøkum korum og endaði á tindinum í tónleikaheiminum. DR hevur verið í USA og fylgt Dolly Parton. Vit eru á konsert við henni í Radio City Music Hall í New York. Eisini verður prátað við ta nú 62 ára gomlu sangstjørnuna og sjálvandi verður eisini komið inn á hennara mongu plastisku skurðviðgerðir.

SvF • Fríggjadag 8. kl. 20.45

**OL - setanin**
Eftir EM-fótbólt og Tour de France er enn ein stór ítróttarstevnan á skránni. Hetta er sjálvandi nógv umtalaða Olympiadan, sum hesaferð verður hildin í Kina. Livandi myndir frá fyrireikingunum til setanina eru longu komnar út á alnetið, hóast kinversku myndugleikarnir hava roynt at forða hesum. Myndirnar boða frá eini stórslignari setan.

Tv3 • Mánadag 11. kl. 20.00

**»The Perfect Man«**
Tanáringurin Holly Hamilton er troytt av at flyta hvørja ferðina mamma hennara finnir ein nýggjan sjeik. Holly finnur eina lætt gjørda ætlan, sum skal gera tað eitt sindur lættari fyri seg. Men áðrenn hon veit av, grynnir hon ikki longur.

TELEVARPIÐ

Sosialurin

**Fríggjadagur 8. august 2008**

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**